tíðindablaðið sosialurin

Ábyrgdarblaðstjóri: Tórfinn Smith
Fyritaksstjóri: Krisjan Dahl
Ljósmyndari: Kalmar Lindenskov

Blaðfólk: Randi Jacobsen - Dagny Joensen - Olavur W. Høgnesen - Hilmar Jan Hansen - Justinus Eidesgaard

Útgevari: P/f Sosialurin
Uppseting: P/f Sosialurin
Prent: P/f Pressan 1981

Bústaður: Argjavegi 26, Argjum
Telefon: 11820

Postadressa: Postsmogu 76, 110 Tórshavn
Telefax: 14720

Tað má og skal vera Javnaðarflokkurin

SO SLITNAÐU TÆR samráðingarnar, ið hava verið millum Javnaðarflokkin og Fólkaflokkin um skipan av nýggjum landsstýri.

HETTA var einasti møguleikin at royna, skuldi ein tvíflokka samgonga koma upp á tal.

AT veljarans ynski er, at tað má og skal vera Javnaðarflokkurin ið eigur at mynda og leiða eitt komandi landsstýri, kann eingin ivi vera um. Bæði til løgtingsvalið og nú eisini fólkatingsvalið fekk Javnaðarflokkurin so dygga undirtøku frá Føroya fólki, at alt tos um aðrar møguleikar enn eitt landsstýri við javnaðarleiðslu er at gera greiðu talu veljaranna til einkis.

FYRST varð næststørsti flokkurin, Fólkaflokkurin, royndur. Men meðan samráðingarnar á mangan hátt bóru boð um, at ein skilagóð samgonga kundi fáast burturúr, bar tó ikki til at finna semju um øll mál.

TÍ verða nú aðrir møguleikar royndir, m.a. tann sonevnda heimastýrissamgongan millum Javnaðarflokkin, Sambandsflokkin og Sjálvstýrisflokkin. Hesar báðar seinast nevndu flokkarnir hava báðir verið til kunnandi fundir frammanundan, og nú verður so farið víðari við samráðingunum.

HVAT so spyrst burturúr, og hvørji mál hesir flokkar kunnu koma ásamt um, mugu komandi dagarnir sleppa at vísa.

OG um eisini aðrir møguleikar mugu verða royndir, kemur úrslitið av hesum samráðingum at avgera.

JAVNAÐARFLOKKURIN heldur tó fast um, at ein landsstýrissamgonga eigur at verða skipað sum skjótast.

FRAMVEGIS stendur eisini veljarans tala týðilig: Tað má og skal í hvussu er verða Javnaðarflokkurin!

sosigatey

Dimmalætting · Vágskringvarp Vestanhavs · Dagblaðið · Tinganes Krossur · 14. September · Frjáls Føroyar · Norðurlond

Hatta er gagg, Poul

»Men tað áhugaverda við valinum er, at javnaðarflokkurin ikki hevur so fast tak á veljarunum sum hildið. Var valið mikudagin eitt løgtingsval hevði javnaðarflokkurin mist ein tingmann, sambandið fingið tveir aftrat og fólkaflokkurin ein aftrat. Javnaðarhugsjónin stingur ikki so djúpt, tí valið 17. november var eitt protestval«, skrivar Dimmalætting eftir fólkatingsvalið.

Hetta seinasta árið hevur verið torført at skilja millum journalistiskar greinar og so politiskar og persónligar viðmerkingar á forsíðu Dimmalættingar. Pn, sum annars eigur hópin av áhugaverdum tilfari inni í blaðnum, kann ikki bara sær at blanda sínar egnu persónligu metingar uppí, tá hann skal greiða mongu lesarum Dimmalættingar frá eitt nú úrslitinum av fólkatingsvalinum. Hetta er spell, tí so hevur ikki verið áður. Tá hevði sami pn megnað at skriva slík tíðindi uttan alla tíðina at snara tey til ein sambandskan fyrimun.

Og hvat er tað so, sum sami pn skrivar í síni politisku viðmerking hesaferð! Jú, hann kemur til ta niðurstøðu, at valsigur javnaðarfloksins til løgtingið stakk ikki so djúpt, tí ein mánað seinni, við fólkatingsvalið, fær flokkurin nógv minni undirtøku.

Álvaratos, pn! Hetta er jú reint gagg, og tað veit tú sjálvur. Hví undirmeta stóra lesaraskara Dimmalættngar við eini so tápuligari útlegging.

Tú veitst væl, at eitt løgtingsval verður tikið í nógv størri álvara av føroyska veljaranum enn eitt fólkatingsval, og tað vísti luttøkan jú eisini. Bert annarhvør føroyingur fór á val.

Tá tú nú vil gera sammetingar, hví ert tú tá ikki ærligur og sammetur við síðsta fólkatingsval! Hevði tú gjørt tað, so hevði úrslitið verið eitt heilt annað. Ja, tað vísir, at bæði sambandið og fólkaflokkurin mistu meira enn 1000 — ja, heilar 1000 atkvøður hvør — sammett við valið í 1988, meðan javnaðarflokkurin fór nakrar atkvøður fram. Hví nevnir pn ikki hetta! Ósakligt, pn og ikki einum atsærkomnum blaðmanni líkt. Hví brúka Føroya størsta blað til »at føre læserne bag lyset«!

Javnaðarflokkurin hevði eina framgongd uppá næstan 6% við fólkatingsvalið og taka vit løgtingsvalið og sammeta tað við seinasta løgtingsval, so var linjan tann sama — ein sera stór framgongd til javnaðarflokkin sammett við undanfarna val.

So tá tú skrivar, at fólkatingsvalið vísti, at javnaðarflokkurin ikki hevur so fast tak á veljarunum, so er tað ikki beint. Tað er tvørturímóti bevíst manipulatión við tølunum. Og so á fremstu síðu í tí blað, sum kemur í hvørt heim í landinum.

Tú skrivar, at løgtingsvalið var bara eitt protestval, tað var lummin, ið gjørdi av, hvar krossurin skuldi setast. Jú, víst var tað eitt protestval. Veljararnir vóru so avgjørt ónøgdir við ta táveradni samgonguna og vildu hava javnaðarflokkin aftur í Tinganes. Tú nevnir lumman. Ja, tá øll hjólini í landinum eru steðgað upp og fólk missa arbeiði og rýma av landinum, er greitt, at tey vilja velja ein flokk, sum ynskir at seta gongd á aftur.

Hví royna at undirmeta veljarans dóm og gera hann til einkis, tá hann nú hevur VALT, at javnaðarflokkurin skal taka leiðslúna í Tinganesi!

Nú fáa vit so at síggja, hvussu gongst við at skipa eina samgongu. Javnaðarflokkurin hevur sagt seg fúsan at skipa samgongu við allar aðrar flokkar, eisini sambandsflokkin. Tær samráðingar eru í løtuni, og hyggja vit at politisku søgu okkara, so er tradition fyri samarbeiði millum javnaðarflokkin og sambandið. Hetta kann væl lata seg gera aftur nú, um báðir flokkar eru fúsir til at slaka í sínum krøvum. Ynskir sambandið ikki tað, so er greitt, at javnaðarflokkurin møguliga verður noyddur at leita ótraditionellar leiðir og vita, um møguleiki er at fáa eitt samarbeiði í lag við fólkaflokkin.

Taka vit skrivingina hjá pn í Dimmu og hana hjá ÓB í Dagblaðnum, so kundi okkurt bent á, at hesir báðir helst síggja javnaðarflokkin í andstøðu. Um teir fáa viðhald vil so tíðin vísa. Veljarin gav javnaðarflokkinum eina dyggiliga álitisváttan við løgtingsvalið. Nú er spurningurin um hann sleppur at brúka hetta álit!

Sosialurin

Veruligi vinnarin

Tað er ikki eiti á gleðisrúsi í fólkafloksblaðnum, nú stavnamaðurin akkurát klárað dumpimarkið. Einans 28 atkvøður afturat til sambandið og politiski ekstremisturin fall á fólkatingi og hann var ferdigur í politikki.

Sjálvur gabbar hann nú av, at hann fekk flestar persónligar atkvøður. Jú, er tað nú so løgið, tá hugsað verður um, at fólk siggja sama mann niðri á fólkatingi heldur enn á løgtingi. Har man hann gera sum minst fortreð, munnu tey halda. At formaður javnaðarfloksins ikki fekk eins nógvar atkvøður persónliga botnar sjálvandi í, at fólk vilja hava hann her heima at stýra landinum. At hann so kortini stillaði upp til fólkatingsvalið var óvissan um javnaðarflokkurin sleppur út í Tinganes.

Taka vit so løgtingsvalið, sum er okkara alra val, so sóu vit, hvør var toppskorari. Sami persónur, sum Óli Breckmann hevur svínað út nú í eitt mannamíni, flutti valdømi og læt seg uppstilla í valdøminum hjá Óla Breckmann, ja í sjálvari fólkafloksins háborg. Og hvussu var úrslitið, harra ÓB! Jú, hann gjørdist størsti toppskorari nakrantíð til eitt løgtingsval við næstan 1500 atkvøðum. Um somu tíð kundi stavnamaðurin notera sær eitt fall uppá meira enn 200 atkvøður, soleiðis at hann í sínum egna valdømi bert fekk góðar 400 atkvøður, also meira enn 1000 atkvøður færri enn Atli Dam. Jú, fólkið hevur talað við bæði løgtingsval og fólkatingsval. Við løgtingsvalið søgdu tey, at tey vildu hava Atla Dam og ikki Óla Breckmann. Við fólkatingsvalið góvu tey sama svarið. Tey vilja hava Atla Dam at stýra Føroyum og ikki Óla Breckmann. Hann vilja tey nevniliga hava av landinum — niður á fólkating.

Sosialurin